VALGREINAR

Fólkaskúlin í tí góða samfelagnum

Eyðgunn Samuelsen
valevni Javnaðarfloksins í Norðoyggjum.

Fólkaskúlin hevur seinastu árini havt eina baldruta tilveru. Ósemjur og ónøgd hava verið dagligur kostur. At trivnaður ikki er tilstaðar á einum arbeiðsplássi ávirkar og órógvar øll, ið hava nakað við arbeiðsplássið at gera. At hugurin at læra treytar trivnað millum bæði tey, ið skulu læra og tey, ið læra frá sær, er ein sannroynd, ið ein ikki nýtist at vera lærari fyri at vita. Fyri fólkaskúlan í dag merkir hetta, at trivnaðurin og harvið hugurin at læra hjá næmingunum kanska ikki er tann besti. Har mangla rætt og slætt teir grundleggjandi karmarnir.

Javnaðarflokkurin vil skapa karmar fyri, at øll trívast í skúlanum, og tí skal ársverkið hjá lærarunum endurskoðast. Eisini vilja vit arbeiða fyri, at næmingarnir kunnu fáa heilsugóðan kost í skúlanum, tí vælvera kroppsliga er eisini ein fortreyt fyri læring, eins og ósunnur kostur kann vera við til at skapa matvanar millum tey ungu, ið á longri sikt skaðar heilsuna.

Skúlaverkið í Klaksvík skal raðfestast enn hægri enn í dag. Nú hava vit útbygt barnaansingina, og er tíðin nú komin til at seta fólkaskúlan ovast á dagsskránna. Viðlíkahaldi á Ziskatrøð heldur fram, og skøtil verður settur á útbygging av Ósaskúlanum. Henda útbygging skal ikki bert nøkta ein akuttan hølistørv, men eisini tryggja ein nýmótans skúla, ið hevur høliskarmar til at arbeiða eftir fólkaskúlalógini.

Javnaðarflokkurin borgar eisini fyri einum framskygdum útbúgvingarpolitikki!

Suðuroyggin aftur á Føroyakortið

Marjun Olsen
valevni Sambandsfloksins í Suðuroy

Hon hevur altíð verið har.

At Tjóðveldisflokkurin og Fólkaflokkurin taka sær æruna av, at hava verið serliga góðir við suðuroynna tey seinastu árini, er nógv fyri at hoyra.

Hví fáa vit ein nýggjan Smyril ??

Tí vit hava ein Smyril, sum er so gamal, at hann ikki kann lúka altjóða krøv fyri ferðamannaflutning. Altso undir tvang fáa vit hann.

Tilboðið frá Fólkaflokkinum var gamla Norrøna og høvdu vit sikkurt eisini fingið hana um ikki suðringar (úr øllum flokkum) mótmæltu. Kravið var rímuligt, eitt tíðarhóskandi skip.

Eina nýggja samferðsluhavn fáa vit, ja sjálvandi, tá ongin havn er í oynni sum kann taka eitt tíðarhóskandi suðuroyarskip.

Kostnaðurin er so stórur, at vit suðuroyingar drena landskassan, so lítlar og ongar aðrar ílogur kunnu gerast í landinum, fáa vit skoti í skógvarnar.

Er tað meiningin at vit suðringar nú skulu hava ringa samvitsku ella vera so taksom, at vit ikki aftur í fleiri ár seta nøkur krøv??

Hetta fara sambandsumboðini úr suðuroy, á tingi, ongantíð at lata sær linda. Her er nógv eftur á samferðsluøkinum at gera, áðrenn vit eru á sama støði sum tað mesta av landinum.

Uppreistur á M/S FULLVELDIÐ

Tummas í Garði
valevni Fólkafloksins í Eysturoynni

Søgan um samgonguna, samanborin við eitt skip á einum túri, har manningin ger uppreistur.

"Farvæl Fullveldið! Fullveldið er sokkið, koppað og forlist", ljóðar.

Vit hava sæð Kallsberg og Hoydal skvamblað á sjónum á baksíðuni á Sosialinum. Eg fari at brúka hesa myndina um samgonguna, - sum eitt skip á einum túri. Og eg skal siga tykkum tað sonnu søguna um politisku skútuna Føroyar, sum seinastu 6 árini hevur borið navni M/S Fullveldið.

Ms fullveldið er ikki burturgingin. Ms Fullveldi noyddist at bróta túrin av vegna álop á skiparan, - uppreistur !!

Henda seinasta túrin - hetta 2 ára skeiðið - var tað ein tvitin bakborðs-Tjóðveldissvakt, sum kom umborð.

Tað byrjaði beinanvegin á túrinum, tá høgra hond hjá Hoydal stýrimanni, - ein eysturingur í puntutum keppi og eini Nimeyer í munnklovanum, beint fyri Ólavsøku, í messuni legði á Kallsberg skipara: "Tú hevur fyri 25 árum síðani fuskað við pengum, - gamaní tú rindaði alt aftur og samdist við teir forórættaðu, men tú ert ikki verdur at føra skipið", brigslaði Tobbi.

Anfinn skipari ilskaðist, - bað Tobba skikka sær ordiligt og taka orðini í seg aftur. Hatta var ikki nakað at taka fram mitt á túrinum frammanfyri allari manningini.

Um hann ikki hevði álit á sær, so kundi hann lati vera við at komi við hendan túrin, - og fyri tað seinasta túr eisini. Tobbi hevði jú vita alt um hasa gomlu sakina, langt áðrenn Ms Fullveldi var mannað.

Tobbi bakkaði hendan Ólavsøkumorgunin, men síðani var hann í heilum við tí ringa orðinum um skiparan, saman við mestsum allari Tjóveldisvaktini, íroknað Hoydal stýrimanni.

Teir stoðaðust illa á dekkinum, hesir á Tjóðveldisvaktini, sótu í heilum í messuni hjá mentakokkinum Bjarkhamar og brúktu seg um Skiparan og Hinar á Fólkafloksvaktini. Fóru so illa við 2. stýrimanninum Jørgen, at hann mátti fara frá.

Fáar dagar seinni varð Kokkurin Bjarkhamar koyrd úr Galluni. Hóast flestir av manningini vildu hava føroyska mjólk umborð, so hevði hon keypt danska MATILDE mjólk í staðin, tað dámdi henni best. So var tað slut.

Ms Fullveldið royndi at fáa túrin inn, men ikki var langt fráliðið, so legði øll Tjóðveldisvaktin aftur á skiparan. Teir høvdu ringt heim og fingið ein at skrivað eitt bræv umborð um fuskaríði hjá Kallsberg skipara. Teir hongdu brævið "Skjót Journalistin" upp í messuni, fóru so upp á brúnna og kravdu skiparan frá.

Skiparin, sum hevði havt tol við øllum hesum hundalívinum í 6 ár, sá at her beið ikki bøtur. Gav boð um at bróta túrin av og sigla heim. Samstundis bað hann reiðaríið (Føroya fólk) velja nýggja manning til politisku skútuna. Sjálvur mynstraði hann av og blakaði, sum rætt og ruddiligt var, alla Tjóðveldisvaktina í land.

Hetta er tann verðunliga søgan! Tá ið øll øsingin um Anfinn, um lógarbrot, um kreativa bókføring er kólnað, mugu tey veruligu politisku málini aftur á dagsskrá.

Ms Fullveldi er hvørki koppað ella sokkin.

Ms Fullveldi noyddist rætt og slætt at bróta túrin av, tí har var framt tilætlaður uppreistur umborð.

Nakað var í lastini

Sjálvt um Ms Fullveldið ikki fiskaði í sjálvdrátti, so kundi Fólkaflokksvaktin ikki bara sær fyri at skera lippur, og har vóru so nakrar tilsamans: Bankamálið loyst, Brimil, Sandoyarferja, Suðuroyarskip, Vágatunnil, Noroyartunnil, Landssjúkrahús o.s. fr.

Í lippukassanum hjá Tjóðveldisvaktini var bert ein lippa: Fólkaskúlin. Teir tosaðu nógv um eina kalvaspraggu, sum teir høvdu undir borði, men sum teir ikki fingu inn. Hon æt Fólkakirkjan.

Politiska skútan Føroyar skal nýggjan túr: Hon eitur neyvan Ms Fullveldið á næsta túri. Vit, á Fólkafloksvaktini fara at biðja reiðaríið, Føroyska fólkið, um at sleppa við aftur.

Vóni bara ikki at navni aftur verður Sambandsskútan "Agnes Louise", og vit skulu at fiska við lodd og snøri. Tað verður, sum tey ungu siga í dag: "Tað verður bara for moði".

Mamma á høvdalagnum – Óli og Jóannes á fótalagnum

Finnur Helmsdal
valevni Tjóðveldisfloksins í Suðurstreymi

Latið tykkum ikki lumpa. Hinir tríggir stóru flokkarnir royna, alt tað teir kunnu, at geva fólki eina mynd av, at tað er Tjóðveldisflokkurin, sum er tað ljóta dýrið í opinbáringini. Breckmann og Djurholm royndu ferð eftir ferð at kvala fullveldissamgonguna, og Eidesgaard stóð hvørja ferð klárur giftingarklæddur og við uppreiddari brúðarsong. Men fullveldiskreftirnar, sum tá vóru í Fólkaflokkinum, megnaðu at støðga svikaligu ætlanunum.

Nú er Kallsberg alment farin í sambandspott Fólkafloksins,og hann ger seg í hesum døgum út til fríggjaraferð, klárur at leggja seg á knæ fyri firtnu og fornermaðu forkvinnu Sambandsfloksins. Um Lisbeth ætlar at figgja ovurhondstóra skattalættanum við at hækka blokkstuðulin upp aftur á milliardastøðið, tað rínur ikki við frammanundan ivasama fólkafloksmoralin.

Men hvat ger so Eidesgaard, nú Breckmann og teir reiða upp brúðarsong til sín og sambandsmammuna. Jóannes vil sanniliga eisini sleppa upp í songina. Hugsið tykkum, skal Javnaðarflokkurin aftur í andstøðu, har hann hevur verið síðan 1996. Nei, Jóannes torir ikki at hugsa tað liðugt, hann má og skal upp í brúðarsongina. Og munnu javnaðarmenn, tá avtornar, ikki leggja so nógv í, um teir eru í song við teimum, sum ætla at fordobla blokkstuðulin. Og teir munnu heldur ikki aftra seg við at fara í song við teimum, sum teir í dag siga at Tjóðveldisflokkurin hevur prostituera seg við at sova saman við. Nevniliga Fólkaflokkinum. Javnaðarflokkurin er nevniliga til reiðar at tveita allan moral og øll prinsippir fyri borð, bert teir sleppa upp í songina at fløva seg.

Síggja tit ikki myndina fyri tykkum. Lisbeth liggur har og breiðir seg í brúðarsongini, meðan teir báðir Óli og Jóannes liggja á hvør sínum fótalagi og sutta tummil. Alt meðan Alfred serverar smákøkur og leskidrykkir fyri mammu síni, Johan kølir hana við pálmabløðum, meðan Báður lesur fyri henni tað, sum Dimmalætting skrivar. Um okkurt álvarsligt skal viðgerast, biðjur Lisbeth Óla og Jóannes fara út um at spæla við Heðin og Edmund.

Nei, skulu vit ikki lata hatta vera við hugamyndini. Latið okkum heldur seta ein sterkan Tjóðveldisflokk á ting seinleiðis, at positiva og miðvísa politiska gongdin kann halda fram. Henni er bert lív lagað, um Tjóðveldisflokkurin er við.

VALGREINAR

Tilfeingið er ogn Føroya fólks

Gunnvá Mortensen
valevni Javnaðarfloksins í Norðstreymoy

Spekulatión fyri fleiri milliónir krónur

Loyvi ella fiskirættindi, sum eru latin persónum ella feløgum frá tí almenna, eiga ongantíð at verða til eina søluvøru. Í dag verða fiski- og aliloyvi seld fyri milliónaupphæddir. Tað kemur meira enn so fyri, at skip ella bátar, við tilhoyrandi fiskiloyvi, verða keypt einans við tí endamáli, at fáa vinning burturúr víðari sølu. Sostatt hevur eitt skjal, sum upprunaliga varð latið frá tí almenna fyri einki, fingið eitt virði uppá fleiri milliónir krónur. Slík spekulatión skal steðgast beinanvegin.

Hóast hetta hevur verið almenn vitan leingi, er einki gjørt fyri at steðga hesum ørskapi - hóast búskaparráðið vísti á ein fiskidagamarknað fyri fleiri árum síðan, mugu vit bara ásanna, at einki er gjørt við málið enn.

Tilfeingið í samfelagnum er ogn Føroya fólks

Javnaðarflokkurin ásannar, at tað er uppá tíðina, at seta á stovn ein fiskidagamarknað, sum skal umsita og umseta - bæði fiskiloyvi og aliloyvi. Endamálið við slíkum fiskidagamarknaði er m.a. at staðfesta, at tilfeingið í samfelagnum er ogn Føroya fólks og at útvega eitt størri avkast, sum kemur okkum øllum til góðar.

Eitt loyvi skal latast við brúksskyldu tvs. verður loyvið ikki brúkt í eitt ásett tíðarskeið, fellur tað aftur til marknaðin - hetta tíðarskeiði skal tó verða so mikið langt, at skip í vanligum rakstri, ikki uttan víðari missa loyvið. Tað gjald, ið verður kravt fyri loyvið, verður sum eitt leigugjald, og kann loyvið tí ikki seljast. Henda skipan fer at gera tað lættari hjá nógvum at sleppa fram at fiskivinnuni, tí ikki verður neyðugt at keypa bát ella skip við tilhoyrandi dýrum fiskiloyvi.

Smærri útróðarbátar eiga at vera undantiknir hesi skipan, og skulu ikki hava fyri neyðini at útvega sær fiskiloyvi. Teir skulu fiska frítt.

Tað er avgjørt neyðugt at fáa skipað viðurskifti, tá tað snýr seg okkara tilfeingi, tí fari eg at heita á teg um at velja Javnaðarflokkin tann 20. januar.

Samkynd eru eisini føroyingar

Elin Lindenskov
valevni Javnaðarfloksins í Suðurstreymoy
www.lindenskov.com

Tað er gott at tey samkyndu hava tikið seg saman í felagskapinum Ælabogin. Tí tey hava vissuliga ikki góð kor í Føroyum - og har er veruliga nakað at arbeiða fyri. Hugburðurin er, at føroyingar eru samkyndir - tað er ein sjúka. Sagt á ein annan hátt, so vilja vit ikki hava samkynd í Føroyum. Vit tvinga tey at flyta av landinum, við at gera umstøðurnar ómøguligar hjá teimum.

Eisini á hesum økinum eru vit aftan fyri hini Norðurlondini. Tí er tíðin nú komin, at vit broyta hesi viðurskifti. Allir samfelagsbólkar eiga at vera líka fyri landsstýri, tá hon var framløgd. Bara ein løgtingslimur atkvøddi fyri lógini, tað var Karin Kjølbro. Hesa landaskommina eiga vit at vaska av okkum.

Onnur viðurskifti, sum eiga at broytast eru: At kynsligi lágaldurin fyri samkynd eisini eigur at vera settur til 15 ár, líka sum hjá hinkyntum. Og revsilógin skal ikki gera mun á kynsligum brotsgerðum, líkamikið um tær vera gjørdar móti hinkyndum ella samkyndum. Eg haldi tað vera sera syrgiligt, at ávísir føroyingar sammeta tað at viðurkenna samkynd við at viðurkenna pedofil. Hetta er heilt burturvið. Ein pedofilur ger eina grova brotsgerð móti einum verjuleysum barni, meðan samkynd eru vaksin menniskju, sum eru góð við eitt annað menniskja av sama kyni. Helst eru tað eisini viðurskifti, sum eg ikki eri greið yvir skulu broytast, men tá er tað gott, at vit hava ein felagsskap sum Ælabogan, sum kennir til hesi viðurskifti.Vilt tú velja ein, sum verjir rættindini hjá teimum samkyntu, so eigur tú at hugsa teg væl um, tí vit eru ikki nógv sum verja tey enn, sjálvt um vit gerast fleiri og fleiri.

Vilt tú vita meira, um hvat eg tikist við seinastu 4 árini, so vitja mína heimasíðu www.lindenskov.com. Har liggja hundrað tals greinar, røður o.a. frá hesum tíðarskeiði.

Rækjuskip í neyð

Bjarti Thomsen
valevni sambandsflokksins í Suðurstreymi

Rækjuflotin er um at fara av knóranum. Fyri at steðga hesi gongd, vil sambandsflokkurin lata rækjuskip koma í FAS-skipanina. Aðrir flokkar vilja einki gera, men heldur lata rækjuflotan fara.

Rækjuflotin minkar alsamt, tí þrísurin á rækjum er farin í botn. Sum eina fyribilsloysn, hevur sambandsflokkurin skotið upp, at rækjuskip kunnu skrásetast í FAS í tvey ár. Hervið fáa reiðarí endurgoldið ein part av hýruútreiðslum og raksturin gerst lættari. Nógv eru ímóti hesi loysn, tí hetta ber brá av stuðuli. Sað í mun til aðra vinnu er hetta stuðul, tí FAS skip fáa þening útgoldnan, sum onnur ikki fáa. Sað isolera, er hetta ikki stuðul, tí skipini fáa bert afturgoldið part av tí, sum tey sjálvi gjalda inn í kassan. Landið fær færri inntøkur, men alternativið er helst, at flotin hvørvur og harvið allar inntøkurnar. Tí er tað onki forgjørt í at royna hetta tiltak í tvey ár, meðan mett verður um framtíðarútlitini hjá rækjuvinnuni.

Fyri at taka støðu til hvat skal gerast framyvir, er neyðugt at kanna útlitini fyri rækjuvinnuni. Tey seinastu 15 árini er veiðan av rækju vaksin úr 2 mill tons til 3 mill tons. Samstundis er framleiðsla av aldari rækju vaksin úr 0,5 mill tons til 1,5 mill tons. Sostatt er parturin av aldari rækju vaksin úr 20-25% til 30-35%.

Veiðan av okkara rækju (Pandalus borealis) er um 10% av allari rækjuveiðu.

Thailand hevur í longri tíð verið størsti framleiðari av aldari rækju, men serliga síðan 2000 hevur vøkstur verið í aldari rækju úr Kina, Brasilia og Vietnam. Fyrst í 1990'unum vaks aliframleiðslan eisini nógv, men tá datt hon niðuraftur orsakað av sjúkutrupulleikum.

Marknaðurin fyri rækjum er øktur nógv. Í USA, er t.d. forbrúk pr persón vaksið tey seinastu 12 árini frá 2,3 pund til 3,7 pund.

Samanspælið millum veiðu og aling av rækju og hvussu marknaðurin háttar sær, má kannast meira gjølla. Út frá hesum kann so metast um, hvat rættast er at gera framyvir. Bert at goyggja um, at stuðul er av tí ónda, uttan at kanna viðurskiftini, er ábyrgdarloysi.

Undirritaði bjóðar seg fram at finna loysnir, sum byggja á væl grundaðar metingar. Tann 20. januar hevur tú møguleika at stuðla mær við hesi ætlan. Sí meira á www.samband.fo

Tjóðskaparliga semjan

Rasmus Niclasen
valevni Javnaðarfloksins í Vágum

Javnaðarflokkurin hevur ta greiðu fatan, at eitthvørt stig, ið verður tikið á sjálvstýrisleið, má byggja á breiðar semjur. Tað má byggja á felags mið og mál fyri alla tjóðina og flokkarnar.

Hesi síðstu 6 árini hava prógvað, at ongi úrslit røkkast, um fólkið ikki er við. Endaleysar ósemjur hava í alt ov stóran mun sett dagsskránna. Eftir hvørt miseydnað samráðingarumfar við danir varð kósin bara snara eitt sindur, og so herjaða teir á til næsta fund, uttan stev og uttan mál.

Heimastýrislógin hevur roynst okkum væl í meir enn eina hálva øld, men tíðin er komin til broytingar. Greiða má fáast á valds- og ábyrgdarbýtinum millum føroyskar og danskar myndugleikar.

Á grundlógarstevnuni var semja um, at Føroyar kann skipa seg í samveldi, um tað er tað, ið fólkið ynskir og áhaldandi vísir á tað.

Sjálvsavgerðarrætturin er tí ómissandi, so longi Føroyta fólk og Føroya land eru til. Tí vilja vit hava ein sjálvstýrissáttmála, ið staðfestir føroyingar sum tjóð og Føroyar sum eitt land við sjálvsavgerðarrætti.

Javnaðarflokkurin vil virka fyri, at savna flokkarnar á tingi í sjálvstýrismálinum, soleiðis, at leiðin vit velja at ganga byggir á ta breiðu tjóðskaparligu semjuna.

Vinnan í Suðuroynni!

Politiski myndugleikin eigur at skapa karmarnar fyri vinnuni

Jóhanna í Ólavsstovu

So hendi tað aftur, aftur eitt bakkast fyri Suðuroynna. Í vikuni frættu okur at Norrøna og harvið eisini Smyril broyta ferðaætlanina, og hettar inniber so at nú gerst uppaftur truplari hjá flakavinnuni her suðuri at fóta sær.

Fiskivinnan er lívsgrundarlagið hjá suðringum og tí má politiski myndugleikin skapa møguleikar hjá hesu vinnuni at kappast á jøvnum føti við fiskivinnuna á meginøkinum. Politikkarin skal halda fingrarnar vekk frá stýringini av vinnuvirkjunum, hettar hava teir prógva at teir ikki duga, men politikkarin hevur hinvegin ábyrgd av at skapa karmar fyri vinnuni.

Suðuroyarfjørður er okkara landavegur inn á meginøki, tað er ábyrgdin hjá okra politikkaraum at syrgja fyri at hesin landavegurin ikki aðrhvørja løtu er stongdur og, at okur ikki javnt og savnt sitað føst í einum trafikkproppi tí øll onnur eiga fyrstarættin til kaiplássini.

Skal vøran flytast inn á meginøki, áðrenn hon kann flytast av landinum, er tað polittikarans ábyrgd at syrgja fyri at tað undir ongum umstøðum verða dýrari hjá einum virkið á Suðuroynni at flyta lidnu vøruna á marknaðin, enn tað er hjá einum virkið einahvørja aðrastaðni úr landinum.

Tjóðveldisflokkurin vil virka fyri at vinnan í Suðuroynni kann virkað á jøvnum føti við vinnu aðrastaðni í landinum.